Kvinnurnar sleppa at royna seg

Kvinnulandsliðið skal í summar royna at endurvinna gullmerkini á Oyggjaleikunum. U19 kvinnurnar eru við í enn eini EM-undankapping. Og KÍ skal út í Europa at royna seg. Í heimligu kappingini er líkt til, at tað enn einaferð verður KÍ, sum fer at seta seg á tað mesta

EYÐUN KLAKSTEIN

Fótbóltskvinnurnar hava fleiri spennandi avbjóðingar fyri framman í hesum árinum. Eitt eru tær heimligu kappingarnar, har gullmerki standa upp á spæl í bæði landskapping og steypakapping, men síðani eru eisini altjóða avbjóðingar fyri framman.

Føroysku fótbóltskvinnurnar vóru fyri fyrstu ferð við á Oyggjaleikunum fyri tveimum árum síðani, og tað gekk sum smurt hjá teimum.

Eingin av hinum oyggjunum kláraði at gera nakað við føroyska landsliðið, og tað var ikki fyrr enn í finaluni, at rættilig mótstøða kom. Tað var frá álendska liðnum, sum kláraði at spæla upp ímóti tí føroyska. Men tá samanumkom var tað føroyska landsliðið, sum hevði vunnið gullmerkini.

U19 kvinnurnar fingu besta úrslitið nakrantíð, tá ið tær endaðu næstfremst í sínum EM-undanbólki, sum varð spældur í Bulgaria. Í september mánaði verða tær við í eini nýggjari EM-undankapping í Bosnia-Herzogovina.

Harafturat fer meistaraliðið KÍ at vera við í stóru europeisku kappingini hjá UEFA. Hesari kapping hevur KÍ verið við tvey ár á rað, og tað hevur gingið væl.

KÍ er favorittur

Í fjør var tað KÍ, sum vann bæði steypakappingina og landskappingina, og tað er líkt til at sterka liðið úr Klaksvík stílar eftir einari endurtøku av hesum sigrum í ár.

So at siga allar teir somu spælararnir eru við aftur í ár, og í fyrstu dystunum í ár hava tað eingi tekin verið um, at onnur lið av álvara kunnu seta KÍ upp á pláss.

Eini átta KÍ spælarar eru upp á tal til landsliðið, og tað verða eisini nógvar av teimum, sum koma á liðið í summar.

– Bulurin á landsliðnum verður við kvinnum úr Klaksvík. KÍ hevur dominerað føroyskan fótbólt seinastu tvey árini, og tað er líkt til, at tær fara at halda fram við hesum, sigur Álvur Hansen, landsliðsvenjari hjá kvinnunum.

Profilurin er burtur

Tað verða fleiri broytingar gjørdar á landsliðnum, sum skal verja gullmerkini á Oyggjaleikunum. Teir verða í summar hildnir á Guernsey.

Ein av stóru profilunum frá seinasta, liðskiparin Helga Ellingsgaard, er givin við at spæla fótbólt á høgum stigi, og tí skal ein nýggjur spælari spæla sentrala leiklutin hjá Helgu á miðvøllinum. Líkt er til, at Rannvá Andreasen úr KÍ verður flutt úr álopinum og á miðvøllin hesaferð.

Málverjin Annika Hansen er givin, og har eru avloysararnir Randi Wardum úr HB og Anna Kristina Joensen úr GÍ.

Aðrir spælarar, sum vóru við seinast, vera heldur ikki við hesaferð – til dømis Maria Vang, Rini Mørk, Oddvá Kristiansdóttir og Lydia Vesturtún – men landsliðsvenjarin roknar við, at liðið verður eins sterkt, sum tað var fyri tveimum árum síðani.

– KÍ hevur verið við í Europa Cup tvey ár á rað, og U19 landsliðið hevur verið við í EM. Tað hevur givið nógv fleiri spælarum altjóða royndum, og tað eigur at styrkja liðið, heldur Álvur Hansen.

Harafturat spæla tríggir spælarar í Danmark, og tær kappingarnar eru vanliga á hægri stigi enn tær føroysku.

Manna sterka verju

Landsliðsvenjarin heldur, at tað eru nógvir góðir álopssinnaðir spælarar og miðvallarar, men stóra uppgávan verður at seta saman eina sterka verju, sum kann standa ímóti mótstøðuni á Oyggjaleikunum.

28 spælarar eru inni í myndini til tey 18 plássini á landsliðnum, og longu 28. apríl skal Oyggjaleikanevndin hava nøvnini á teimum, sum skulu vera við. Hetta gevur ikki landsliðsvenjaranum serliga góða tíð til at manna liðið.

Landsliðið hevur longu vant seks ferðir, og ætlanin er at halda fram við regluligum venjingum líka fram til endan av juni mánaði, tá ið Oyggjaleikirnir byrjar.

Annelisa Justesen er saman við hinum spælarunum hjá KÍ stórfavorittur til meistaraheitið í ár.